# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 17-05-2023

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Brúksskylda)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 30, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
“Tá fiskidagar í bólki sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4 verða avhendir, er treytin, at fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin.”

**2.** § 30, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Fyri at avhenda fiskidagar, skulu frá og við 1. januar 2025 í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.”

**3.** § 31, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Fyri at avhenda egnan kvotupart ella egna árskvotu, skulu frá og við 1. januar 2025 í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Nýtslan verður gjørd upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari fiskileið sær. Fyri norðhavssild, makrel og svartkjaft er ásetingin í 1. pkt. galdandi frá og við 1. januar 2026.”

**4.** Í § 31 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um í serligum førum at geva undantak frá treytini sambært stk. 2, 1. pkt. fyri avhending fyri eitt fiskiár í senn.”
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

**5.** § 36 verður orðað soleiðis:

“**§ 36.** Veiðiloyvi, sum ikki er brúkt í tvey fiskiár á rað, fellur aftur til landið, samanber tó § 29. Tá veiðiloyvi fellur aftur til landið, falla veiðirættindini, sum eru knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvum, eisini aftur til landið.

Fyrsta tíðarskeiðið fyri uppgerð av nýtslu byrjar 1. januar 2023.
*Stk. 2.* Hevur fiskifar ikki brúkt rættin til fiskiloyvi til egnar fiskidagar ella egnar kvotur í tvey fiskiár á rað, fellur rætturin til fiskiloyvið aftur til landið. Hevur fiskifar rætt til meira enn eitt fiskiloyvi til fiskiskap eftir ávísum fiskaslagi á ávísari fiskileið, verða fiskiloyvini roknað undir einum. Veiðirættindi, avhendað fyri eitt fiskiár í senn sambært §§ 30 ella 31, verða roknað upp í uppgerðina av brúki hjá avhendara og verða roknað sum ikki brúkt. Fyrsta tíðarskeiðið fyri uppgerð av nýtslu byrjar 1. januar 2023.
*Stk. 3.* Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2.
*Stk. 4.* Brúksskyldan, sambært stk. 2, fevnir ikki um:

1) fiskiloyvi latin útróðrarbátum sambært § 18, stk. 1, nr. 5 og onnur fiskiloyvi latin útróðrarbátum undir 15 tons,
2) rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 í gildistíðini sambært § 9,
3) rættindi, ið er partur av umbýti sambært § 24, og
4) fiskiloyvi latin til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti til og við 31. desember 2025."

**6.** Í § 64, stk. 2 verður "§ 31, stk. 4" broytt til: "§ 31, stk. 5".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Lógaruppskotið verður lagt fram fyri at broyta og tillaga ásetingarnar um brúksskyldu, sum komu í gildi á nýggjárinum, men sum fyrstu ferð fáa týdning fyri rættindahavarar í 2024.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Í galdandi sjófeingislóg kemur brúksskylda fyri tríggjar ferðir:

1) 60%-reglan: Treytin fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar árskvotur er, at tú hevur brúkt 60% av tínum døgum ella kvotu fiskiárið frammanundan (grein 30 og 31). Hendan reglan, sum knýtir brúkstreyt at møguleikanum at keypa og selja kvotur ella fiskidagar, hevur verið partur av lógarverkinum síðani 2002. Endamálið er at forða fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at avhenda fiskidagar ella kvotur til aðrar skipaeigarar (løgtingsmál 65/2001, løgtingslóg 38/2002).

   Frá 2004-2017 var 60%-kravið bert galdandi fyri alla avhending av egnum fiskidøgum og bert fyri botnfiskakvotur í íslendskum sjógvi.

   Tá løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi kom í gildi í 2018, varð nýggj skipan gjørd fyri avhendingar av kvotum og fiskidøgum. 60%-reglan var varðveitt, men fevndi nú um allar eginkvotur og allar egnar fiskidagar. Tey bæði árini, tann lógin var galdandi, fingu

ásetingarnar um brúksskyldu tó ongantíð týdning, tí ætlaða skipanin fyri avhending av rættindum varð ikki sett í gildi.

Í galdandi løgtingslóg um sjófeingi fekk 60%-reglan gildi 1. januar 2023. Hetta merkir m.a., at í 2023 er einki krav um, at rættindahavarar skulu hava brúkt 60% av rættindum sínum árið frammanundan fyri at kunna avhenda. Eftir verandi ásetingum fær treytin týdning fyri avhendingar av egnum kvotum og egnum fiskidøgum í 2024.

Eftir galdandi lóg eru fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur undantikin 60%-regluni fyri avhending av kvotum.

2) Í galdandi lóg er eisini ein generell brúksskylda, sum sigur, at um fiskifar als ikki hevur brúkt veiðiloyvi og fiskiloyvi í tvey fiskiár á rað, falla loyvini aftur til landið (grein 36, stk. 1). Hetta merkir, at tá rættindi skulu útskrivast við ársbyrjan 2025, skal myndugleikin kanna eftir, um loyvishavarin hevur hildið brúksskylduna fyri veiðiloyvi og fiskiloyvi. Brúksskyldan á veiðiloyvi kom fyrstu ferð í lógarverkið í 2018. Hon hevur tó ongantíð havt virknað, tí at gildiskoman hevur verið útsett.

3) Galdandi lóg ásetir harumframt, at um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, sum er brúkt og 30%, aftur til landið (grein 36, stk. 2). Hetta merkir, at tá egnir fiskidagar og egnar kvotur skulu útskrivast fyri fiskiárið 2024, skal myndugleikin kanna eftir, um loyvishavarar hava brúkt meira enn 30% í 2023. Hava tey ikki tað, missa tey dagar ella part av kvotuni.

Síðani galdandi løgtingslóg um sjófeingi kom í gildi 1. januar 2020, hava tvey uppskot verið í Løgtinginum um at broyta ásetingarnar um brúkskyldu. Í 2021 var eitt uppskot lagt fram um at broyta og nágreina ásetingarnar um brúksskyldu, sum eftir reglunum tá skuldu koma í gildi 1. januar 2022 (løgtingsmál 030/2021). Politiska viðgerðin av tí uppskotinum og viðmerkingarnar í hoyringini bendu greitt á, at undirtøka ikki var fyri tí skipan við brúksskyldu, sum verandi lógartekstur leggur upp til. Og tá ið av tornaði, var eisini gjørt av at útseta gildiskomuna við einum ári, og at viðgera spurningin um brúksskyldu nærri í 2022.

Eftir nærri politiska viðgerð í 2022 varð uppskot lagt fyri Løgtingið í fjør heyst um at broyta reglurnar meira grundleggjandi, men hetta uppskotið datt burtur, tá løgtingsval varð útskrivað (løgtingsmál 032/2022).

Støðan í løtuni er tí tann, at tað eru upprunaligu lógarorðingarnar um brúksskyldu, sum eru galdandi. Hesar orðingar leggja upp til eina skipan um brúksskyldu, sum av fleiri orsøkum hevur tørv á broytingum og dagføringum.

Sum tað fyrsta verður ikki mett, at óbrúkt fiskirættindi í løtuni er ein so stórur trupulleiki, at tað rættvísger ta skipan fyri brúksskyldu, sum er í verandi løgtingslóg. Tey flestu føroysku veiðirættindini í 2023 fara at verða brúkt. Okkurt fer at liggja eftir, men mett verður ikki, at hetta fer at vera ein varandi trupulleiki. Eins og undanfarin ár er væntandi, at summi veiðirættindi framvegis ikki fara at verða brúkt ella lítið brúkt, men fara neyvan at gerast virkin við eini brúksskyldu.

Harnæst verður mett, at við tí fløktu skipanini við brúksskyldu, sum er í galdandi lóggávu, er skjótt, at skipanin fær ótilætlaðar og óhepnar avleiðingar. Yvirskipaða endamálið við brúksskylduni er at tryggja, at tey brúksrættindi, landið letur, verða brúkt. Tí eiga reglurnar

um brúksskyldu ikki at elva til óskynsama og óhepna atferð í vinnuni, til dømis at tvinga rættindahavarar at fiska bert fyri at halda brúksskylduna. Brúksskyldan eigur ikki at leggja óneyðugar forðingar fyri skynsamari gagnnýtslu av tilfeinginum.

Í framhaldi av hesum – sum tað triðja – verður mett, at aðrar skipanir kunnu fara at stuðla uppundir, at tøkir veiðimøguleikar verða brúktir. Eitt nú kunnu møguleikarnir at avhenda egin veiðirættindi millum eigarar av fiskiførum sum frá líður stuðla upp undir at gera óvirkin rættindi virkin.

Grundað á hesi viðurskifti verður skotið upp at broyta galdandi lóg soleiðis, at skipanin við brúksskyldu á fiskirættindi verður gjørd einfaldari og greiðari, og – ikki minst – at skipanin endurspeglar dagsins tørv.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at broyta og tillaga galdandi lógarorðingar um brúkskyldu, so tær samsvara betur við dagsins tørv og eru einfaldari og greiðar at umsita.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið hevur við sær innihaldsligar broytingar í ásetingunum um brúksskyldu í løgtingslógini.

Brúkstreytin fyri at avhenda egnar kvotur ella fiskidagar og generell brúksskylda verður galdandi frameftir, men krøvini til brúksskyldu verða linkað nakað, samstundis sum skipanin verður gjørd einfaldari og greiðari.

Sambært samgonguskjalinum verður brúksskylda ásett í allari fiskivinnuni í tann mun, henda brúksskylda er burðardygg.

Grundgevingar fyri at knýta brúksskyldu at brúksrættinum, sum landið letur til fiskatilfeingið, kunnu vera fleiri.

Yvirskipað eru fiskirættindini, landið letur, ein framíhjárættur at troyta ogn Føroya fólks. Fyri at stuðla undir skynsaman fiskiskap og framleidni í vinnu, hava vit valt eina skipan, sum m.a. ber í sær, at atgongdin at reka vinnuligan fiskiskap er avmarkað. Tað eru ikki øll, ið sleppa upp í part. Tí er rímiligt at áleggja loyvishavara skyldu at brúka fiskirættindini. Um ikki, falla tey aftur til landið og kunnu til dømis verða atkomulig hjá øðrum.

Brúksskyldan skal eisini undirstrika, at fiskirættindi ikki eru privat ogn hjá loyvishavara. Tey eru ein tíðaravmarkaður brúksrættur - ein rættur, ið er til láns.

Fiskirættindi eru ætlað til vinnuligt virksemi og grundarlag undir inntøkum til samfelagið. Verða rættindini ikki brúkt, kann vera talan um óhepna fyriskipan, har virði ikki koma til høldar. Ein brúksskylda kann bøta um hetta.

Víst kann eisini vera á, at fiskimøguleikar okkara aðrastaðni í nógvum førum eru fingnir til vega afturfyri rættindi í føroyskum sjógvi. Verða hesir fiskimøguleikar ikki brúktir ella lítið brúktir, hava vit goldið fyri nakað, ið vit ikki fáa gagn av.

Hetta lógaruppskotið varðveitir verandi grundreglur um brúksskyldu, bæði viðvíkjandi brúkstreytini fyri at kunna avhenda veiðirættindi og í generellu brúksskylduni á veiðiloyvi og fiskiloyvi.

Víðvíkjandi **60%-regluni í sambandi við avhending av egnum fiskidøgum og egnum kvotum** verður skotið upp at gera tvær broytingar.

Tann fyrra er at seta inn eina nýggja heimild, so at tað í serligum førum ber til at víkja frá 60%-regluni fyri avhending av egnum kvotum fyri eitt fiskiár í senn. Talan er serliga um føri, har heildarkvotur í nøgd eru somikið lítlar og smábýttar, at tað ikki er grundarlag fyri rakstri hjá øllum fiskiførunum í bólkinum. Tá er skynsamt í einum fiskiári ella styttri tíðarskeiði at loyva skipum at avhenda uttan at vera bundin at brúkstreytini, og at savna rættindini á færri fiskifør. Hetta kann eisini stuðla undir, at fiskimøguleikarnir verða brúktir.

Hin broytingin er, at ásetingin, sum undantekur fiskasløgini norðhavssild, makrel og svartkjaft 60%-regluna, verður gjørd tíðaravmarkað og fer úr gildi 31. desember 2025. Hetta merkir, at frá og við fiskiárinum 2026 er 60%-reglan eisini galdandi fyri avhending av kvotum av nevndu fiskasløgum. Orsøkin til broytingina  er, at mett verður ikki, at tað er grundarlag fyri áhaldandi at hava serligar reglur fyri útvald fiskasløg ella fiskiskap. Allir rættindahavarar til hesi fiskasløg eiga at verða javnsettir við aðrar rættindahavar, tá um lógartreytir fyri avhending ræður. Skal undantak gevast frá 60%-regluni, skal tað vera gjørt fyri styttri tíð, tá t.d. serlig viðurskifti gera seg galdandi í ávísum fiskiskapi.

Viðvíkjandi **generellu brúksskylduni** er lagt upp til at varðveita verandi brúksskyldu á veiðiloyvi og fiskiloyvi. Hesi bæði loyvissløgini hava ymisk endamál í skipanini. *Veiðiloyvi* gevur atgongd at reka vinnuligan fiskiskap við føroyskum fiskifari. *Fiskiloyvi* verður latið fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn, og gevur atgongd til ávísan fiskiskap, t.d. at fiska makrel ella at royna eftir botnfiski í fiskidagaskipanini undir Føroyum. Hvørt fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi.

Í uppskotinum er brúksskyldan á veiðiloyvi óbroytt. Um fiskifar við veiðiloyvi als ikki hevur verið til vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað – tað vil siga, ikki er skrásett at hava avreitt – fellur veiðiloyvið aftur til landið. Øll fiskiloyvi, ið eru knýtt at fiskifarinum, falla tá eisini aftur til landið.

Viðvíkjandi fiskiloyvum er ásett, at um eigari av fiskifari ikki hevur brúkt ávíst fiskiloyvi við egnum fiskidøgum ella egnum kvotum í tvey ár á rað, fellur hetta fiskiloyvið aftur til landið. Viðkomandi missir rættin til tað ávísa fiskiloyvið, men varðveitir annars veiðiloyvið og rættin til hini fiskiloyvini. Um viðkomandi fiskifar bert hevur eitt fiskiloyvi, sum ikki lýkur brúksskylduna, missir fiskifarið eisini veiðiloyvið, tí eftir løgtingslógini er veiðiloyvið treytað av, at eigarin hevur ræðið á veiðirættindum.

Við hesum uppskotinum verða reglurnar, um hvussu brúk av fiskiloyvum verður gjørt upp, orðaðar neyvari. Hetta merkir, at fyri t.d. botnfisk í Barentshavinum verður fiskiskapurin í russiskum og norskum sjógvi og til Svalbardøkið roknað sum ein eind. Annað dømi er, at í fiskiskapi eftir makreli í Norðuratlantshavi kann sama fiskifar av fyrisitingarligum orsøkum ofta hava fleiri fiskiloyvi. Tá brúkið av loyvunum verður gjørt upp, ber til at rokna øll loyvini sum eitt.

Undantikin brúksskylduni á fiskiloyvi eru fiskiloyvi og veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons. Somuleiðis eru rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 og rættindini, ið er partur av sonevndum kvotu-transfers undantikin brúksskyldu. Ásett er somuleiðis, at fiskiloyvi til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti eru undantikin brúksskyldu til 31. desember 2025.

Høvuðsbroytingin í hesum uppskotinum viðvíkjandi generellu brúksskylduni er tó, at lagt er upp til at strika ásetingina um, at tá egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30%, fellur munurin millum 30% og tað, sum er brúkt, aftur til landið. Orsøkin er, at ásetingin verður mett at vera í so víðgongd, sammett við dagsins tørv. Broytingin ber í sær, at brúksskyldan á egnar kvotur og egnar fiskidagar verður linkað. Brúksskylda verður tó framvegis á flestu fiskiloyvum, og tí fer tað frameftir heldur ikki at bera til at liggja á kvotum ella fiskidøgum í meira enn tvey ár, uttan at brúka rættindini.

Uppskotið ber samanumtikið í sær, at verandi lógarásetingar um generellu brúksskylduna verða linkaðar. Men her er vert at hava í huga, at higartil hevur eingin brúksskylda verið á fiskirættindunum, landið letur. Tann, ið hevur fiskirættindi, hevur sum meginregla kunna sitið við rættindunum í allari gildistíðini, uttan at brúka tey. Nú brúksskylda er løgd á fiskirættindi, gera broytingarnar í hesum uppskotinum, at lagt verður varligari fyri, enn galdandi lóggáva leggur upp til.

Uppskotið byggir á umstøðurnar og fyritreytirnar í dag. Um tað seinni vísir seg, at broytingarnar í hesum uppskotinum hava ótilætlaðar avleiðingar, ella at óbrúkt veiðirættindi verður ein størri trupulleiki frameftir, ber til at tillaga regluverkið.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ........

Hoyringarsvar komu frá ........

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Fyri landið verður mett, at tær broytingar, ið uppskotið hevur við sær, fara at gera, at regluverkið fyri brúksskyldu á fiskirættindi verður greiðari og lættari at umsita.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Broytingarnar í reglunum um brúksskyldu ávirka karmarnar hjá vinnuni. Heimildin at geva undantak frá 60% brúkstreytini fyri avhendingar fyri eitt ár í senn er ætlað til støður, har t.d. heildarkvotur eru lítlar og smábýttar, og har vinnan hevur møguleika at savna rættindi á færri skip, og harvið at leggja fiskiskapin skynsamt til rættis. Harafturat fer tað væntandi at gagna vinnuni, at generella brúksskyldan verður tillagað og gjørd einfaldari. Tað hevur eisini týdning fyri vinnuna at strika ásetingina í galdandi lóg, sum sigur, at um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30%, fellur munurin millum 30% og tað, sum er brúkt, aftur til landið.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki avleiðingar fyri umhvørvið. Rúmaru møguleikarnir at kasta saman kvotur á færri fiskifør, fyri at optimera raksturin, tó at heildarkvotur eru lítlar, kann óbeinleiðis vera eitt íkast í orkusparing og at minka um útlátið av veðurlagsgassi.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á teimum økjum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harímillum Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at hetta uppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at geva undantak frá treytini um, at fyri at avhenda egnar árskvotur fyri eitt ár í senn skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotunum vera fiskaðar fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.

Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

### Til nr. 1
*§ 30, stk. 1, 2. pkt.*
Ásetingin verður broytt, so hon er greiðari og neyvari. Fiskidagar kunnu hava ymiskan uppruna og fyritreytir. Fiskidagaskipan er ikki einans í føroyskum sjógvi, men eisini í t.d. føroyska fiskiskapinum eftir rækjum við Svalbard. Fyri at leggja upp fyri hesum, verður ásetta treytin um skipastødd og framtøkumegi umorðað, so hon bert vísir til fiskidagar í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi sambært grein 18.

Fyri t.d. avhendingar av fiskidøgum við Svalbard er hendan treytin um skipastødd og framtøkumegi ikki viðkomandi.

### Til nr. 2
*§ 30, stk. 2*
Hendan greinin ásetir, at fiskidagar bert kunnu avhendast, tá í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan eru brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Tað, sum við hesum uppskotinum verður broytt, er viðvíkjandi gildiskomuni. Ásett er, at treytin er galdandi frá og við 1. januar 2025. Hetta merkir, at fyri at kunna avhenda fiskidagar í 2025, skulu í minsta lagi 60% vera brúktir í 2024.

Uppgerðin, av hvussu nógv er brúkt, tekur støði í teimum fiskidøgum, sum fiskifarið fær tillutað - tað vil siga teir dagar, sum eitt fiskifar hevur tøkt, áðrenn avhendingar. Rættindi, sum verða avhendað, telja við í uppgerðini hjá tí, sum avhendir tað árið, avhendað verður.

Dømi: Fiskifar A fær í 2024 tillutað 100 fiskidagar og avhendir fiskifari B 50 dagar. A brúkar sjálvt 50 dagar í 2024. Tá myndugleikin skal kanna eftir, um fiskifar A kann avhenda fiskidagar í 2025, verður staðfest, at A lýkur ikki 60%-regluna, tí bara 50% av tillutaðu døgunum eru brúktir í 2024. A kann sostatt ikki avhenda fiskidagar í 2025. Halda vit okkum til sama dømi, merkir ásetingin eisini, at tá dagabrúkið hjá fiskifari B í 2024 skal gerast upp í 2025, vera fiskidagarnir, sum fiskifar B hevur tikið ímóti frá A í 2024, ikki tiknir við, tá myndugleikin skal kann eftir, um fiskifar B lýkur 60%-brúkstreytina fyri at kunna avhenda í 2025. Teir dagarnir, sum fiskifar A hevur latið fiskifari B í 2024, verða í uppgerðini roknaðir sum ikki brúktir hjá fiskifari A.

**Til nr. 3**
*§ 31, stk. 2*
Við hesum uppskotinum verða tríggjar broytingar gjørdar í hesi greinin: Tann fyrsta er viðvíkjandi gildiskomuni á 60%-regluni, t.e. ásetingin um, at egnar árskvotur bert kunnu avhendast, tá í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni fiskiárið frammanundan eru brúktir. Uppskotið ásetir, at treytin er galdandi frá og við 1. januar 2025. Hetta merkir, at fyri at kunna avhenda egna árskvotu í 2025, skulu í minsta lagi 60% vera brúkt í 2024.

Uppgerðin, av hvussu nógv eitt fiskifar hevur brúkt av síni eginkvotu, tekur støði í teimum rættindum, sum fiskifarið fær tillutað, tað vil siga, at talan er um kvotur av ávísum fiskaslagi, sum eitt fiskifar hevur rætt at fiska, áðrenn avhendingar. Rættindi, sum verða avhendað, telja við í uppgerðini fyri fiskifarið, sum avhendir, tað árið avhendað verður.

Dømi: Fiskifar A fær í 2024 tillutað 1.000 tons av toski á Flemish Cap og avhendir fiskifari B 500 tons. A fiskar sjálvt 500 tons í 2024. Tá gjørt verður upp í 2025, verður staðfest, at A líkur ikki 60%-regluna, tí bara 50% av tillutaða fiskaslagnum eru brúkt í 2024. A kann sostatt ikki í 2025 avhenda av síni eginkvotu av toski á Flemish Cap til annað fiskifar. Hetta merkir eisini, at tá brúkið hjá B í 2024 skal gerast upp, vera rættindi, sum B hevur tikið ímóti frá A í 2024 fyri eitt ár í senn og veiðan av teimum, ikki tikin við í metingina av, hvørt 60%-reglan hjá B er lokin.

Onnur broytingin er at seta eina nýggja orðing inn, sum sigur, at gjørt verður upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari fiskileið sær. Í til dømis fiskiskapi eftir makreli í Norðuratlantshavi kann sama fiskifar av fyrisitingarligum orsøkum ofta hava fleiri fiskiloyvi. Tá brúkið verður gjørt upp, vera øll loyvini roknað sum eitt. Annað dømi er botnfiskur í Barentshavinum. Har fáa skipini eitt loyvi til russiskan sjógv, eitt til norskan sjógv og eitt til fiskiverndarøkið við Svalbard. Í sambandi við brúksskyldu á fiskiloyvi er lagt upp til, at tað skal bera til at rokna fiskiskap eftir botnfiski í Barentshavinum sum eina eind og øll loyvini sum eitt loyvi. Sama ger seg galdandi fyri botnfisk í grønlendskum sjógvi, hóast tillutingin kann vera á ymiskum fiskiloyvum.

Triðja broytingin í grein 31, stk. 2 er, at undantakið fyri norðhavssild, makrel og svartkjaft í galdandi lóg verður gjørt tíðaravmarkað, so tað er galdandi til og við 31. desember 2025. Hetta ber í sær, at frá og við 2026 eru kvoturnar av hesum fiskasløgum undir somu lógaravmarkingum sum aðrar egnar árskvotur, tá um avhending ræður. Allir rættindahavarar við egnum árskvotum verða tá javnsettir. Mett verður ikki, at grundarlag er áhaldandi at lata sersømdir til kvotur av norðhavssild, makreli og svartkjafti.

**Til nr. 4**
*§ 31, stk. 3*

Skotið verður upp at seta inn eitt nýtt stk. 3, sum heimilar landsstýrismanninum í serligum førum at geva undantak frá treytini um, at rættindini bert kunnu avhendast fyri eitt ár í senn, um avhendarin árið frammanundan hevur brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðari kvotu, sum ætlanin er at avhenda.

Støður kunnu vera, har árligu fiskimøguleikarnir hátta seg soleiðis, at tað ikki loysir seg hjá øllum fiskiførum í bólkinum við ávísum rættindum at fara til fiskiskap. Talan kann vera um støður, har heildarkvoturnar gerast so lítlar, at kvoturnar verða smábýttar millum skipini. Ein støða við lítlum heildarkvotum kann standa við í fleiri ár, og tá kann vera meira skynsamt í eitt áramál at hava møguleika at samla kvoturnar á færri fiskifør. Í slíkum førum eigur at bera til at geva undantak frá brúkstreytini, soleiðis at rættindi kunnu avhendast øðrum, hóast t.d. einki hevur verið brúkt av kvotuni árið fyri. Sum dømi kann nevnast føroyska kongafiskakvotan í Irmingerhavinum, har heildarkvotan í nógv ár var so lítil, at nøgdin, sum var býtt út á fýra skip, ikki var til ein túr hjá einum skipi. Eisini er dømi um ár, har lodnukvotan hevur verið lítil. Í slíkum førum við lítlum heildarkvotum verður mett, at tað eigur at bera til at avhenda kvotuna fyri eitt fiskiár í senn, hóast fiskifarið fiskiárið frammanundan ikki hevur gagnnýtt meira enn 60%.

Slík undantøk eru ætlað at verða givin í ávísum fiskiskapi og ikki sum undantak til einstøk fiskifør. Tí er eisini ásett, at talan er um eina heimild hjá landsstýrismanninum at áseta reglur. Undantakið er ikki ætlað til støður, har heildarkvotan ikki kann sigast at vera óvanliga lítil, og har einstøk fiskifør tó, orsakað av upprunaliga smáum kvotum, ikki halda seg hava kvotu til skynsaman rakstur.

**Til nr. 5**
*§ 36*
Í verandi loyvisskipan í vinnuligum fiskiskapi eru tvey sløg av loyvum: 1) *Veiðiloyvi*, sum er tann rættur, eigari av ávísum fiskifari fær at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. 2) *Fiskiloyvi*, sum verður latið eigara av fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn og gevur atgongd til ávísan fiskiskap, t.d. eftir makreli ella til fiskidagar undir Føroyum. Hvørt fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi.

Stk. 1. Hendan greinin leggur brúksskyldu á veiðiloyvini. Ásett er, at um fiskifar við veiðiloyvi als ikki hevur verið til vinnuligan fiskiskap tvey ár á rað – tað vil siga, ikki er skrásett at hava avreitt í hesum tíðarskeiði – fellur veiðiloyvið aftur til landið.

Í grein 29, sum víst verður til í hesi lógargrein, kann landsstýrismaðurin veita eigara av fiskifari, sum verður tikið úr vinnuligum fiskiskapi, tilsøgn um, at veiðiloyvið innan tvey ár kann verða flutt á annað fiskifar. Í tíðini slík tilsøgn ikki er sett í gildi, er veiðiloyvið óvirkið. Brúksskyldan er tí ikki galdandi fyri veiðirættindini, ið vóru knýtt at fiskiloyvunum, sum fiskifarið hevði, tá tilsøgnin viðvíkjandi veiðiloyvinum var givin.

Ásett er, at fyrsta tíðarskeiðið fyri uppgerð av nýtslu byrjar 1. januar 2023. Hetta merkir, at við fiskiársbyrjan 2025, skal myndugleikin kanna eftir, um brúksskyldan á veiðiloyvunum er hildin. Verður t.d. staðfest, at fiskifarið als ikki hevur avreitt í 2023 og í 2024, falla veiðiloyvi og øll veiðirættindi hjá fiskifarinum aftur til landið.

Stk. 2. Her er ásett, at um ávíst fiskiloyvi als ikki er brúkt tvey ár á rað, fellur rætturin til hetta fiskiloyvið aftur til landið. Hvørt fiskifar hevur eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi. Hevur fiskifar fleiri fiskiloyvi, merkir brúksskyldan, at um eitt av fiskiloyvunum

ikki lýkur brúksskylduna, er tað bert hetta loyvið, ið fellur aftur til landið. Um fiskifar bert hevur eitt fiskiloyvi, sum ikki lýkur brúksskylduna, missir viðkomandi eisini veiðiloyvið, tí eftir grein 5, stk. 1, nr. 1 er veiðiloyvið treytað av, at eigarin hevur ræðið á veiðirættindum, og at hesi eru knýtt at fiskifarinum.

Í fiskiskapi eftir botnfiski í Barentshavinum fær hvør flakatrolari eitt fiskiloyvi til hvørt fiskiveiðiløgdømi í økinum: eitt loyvi til russiskan sjógv, eitt til norskan sjógv og eitt til fiskiverndarøkið við Svalbard. Í øllum hesum loyvum eru mestsum somu fiskasløg, eins og talan er um somu rættindahavarar. Í sambandi við brúksskyldu á fiskiloyvi er tí lagt upp til, at tað skal bera til at rokna t.d. fiskiskap eftir botnfiski í Barentshavinum sum eina eind og øll loyvini sum eitt loyvi. Hetta merkir, at hevur ein loyvishavari í Barentshavinum t.d. brúkt síni loyvi til russiskan og norskan sjógv, men ikki brúkt Svalbardloyvið í tvey ár á rað, fellur hetta loyvið ikki aftur til landið, tí øll loyvini í Barentshavinum verða roknað sum eitt við atliti at brúksskyldu. Sama grundregla verður fyri t.d. botnfisk í Eysturgrønlandi, har nøkur skip hava rætt til fiskiloyvi í ymiskum veiðiskipanum, men eftir somu fiskasløgum.

Ásett er, at fyrsta tíðarskeiðið fyri uppgerð av nýtslu byrjar 1. januar 2023. Hetta merkir, at tá fiskiloyvi skulu skrivast út í fiskiárinum, sum byrjar 1. januar 2025, skal myndugleikin kanna eftir, um brúksskyldan er hildin. Vísir tað seg t.d., at eitt ávíst fiskiloyvi ikki er brúkt í 2023 og í 2024, er brúksskyldan ikki hildin, og fiskiloyvið fellur aftur til landið. Avleiðingin av hesum er, at fiskifarið missir rættin til viðkomandi fiskiloyvi, men varðveitir veiðiloyvið og hini fiskiloyvini.

Viðvíkjandi uppgerð av brúkinum er ásett, at veiðirættindi, ið eru avhendað fyri eitt ár í senn, vera tikin við í uppgerðina av brúki hjá avhendara. Tað vil siga, at avhendir eitt fiskifar t.d. alla sína kvotu av toski á Flemish Cap fyri eitt ár í senn, verður fiskiloyvið roknað sum óbrúkt hjá avhendara tað árið.

Stk. 3. Her er heimild í serstøkum førum at geva undantak frá brúksskylduni á fiskiloyvi. Talan skal vera um, at serlig viðurskifti gera seg galdandi. Eitt dømi kann vera, at í einum fiskiári er gjørt av at geva undantak frá 60%-regluni í greinunum 30 ella 31, tað vil siga, at fiskidagar ella kvotur kunnu avhendast, uttan at loyvishavarin skal hava brúkt 60% av rættindunum árið frammanundan. Fyri at øll skipanin skal hanga saman, eigur í slíkum førum eisini at vera møguligt at geva undantak frá brúksskylduni á viðkomandi fiskiloyvi, soleiðis at tað fiskiárið ikki telur við, tá myndugleikin skal kanna eftir, um brúksskyldan er hildin í tilvísingarskeiðinum, sum er trý tey undanfarnu árini. Talan kann eisini vera um at geva tíðaravmarkað undantak frá brúksskylduni á fiskiloyvi, tá ið veiðibann er lýst fyri ávísan fiskiskap, ella at stovnurin er so illa fyri, og staðfest er, at lítið og einki er at fáa. Umráðandi er, at talan skal vera um umstøður, sum loyvishavarin ikki sjálvur hevur ræðið á ella kann leggja upp fyri við skynsomum rakstri.

Stk. 4. Henda grein ásetir, hvat er undantikið brúksskylduni til fiskiloyvi í stk. 2.

Stk. 4, nr. 1. Eins og í galdandi løgtingslóg eru fiskiloyvi hjá bátum undir 15 tons, bæði í bólki 5 í fiskidagaskipanini og t.d. hummaraloyvi undantikin brúksskylduni.

Stk. 4, nr. 2. Veiðirættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 eru ikki fevnd av brúksskylduni í uppboðssølutíðarskeiðinum, tað vil siga, inntil rættindini eru løgd um til egnar árskvotur sambært grein 9 í løgtingslógini. Tá uppboðssølurættindi eru løgd um til egnar árskvotur, eru tey eins og onnur egin veiðirættindi fevnd av ásetingunum um brúkskyldu sambært grein 36.

Stk. 4, nr. 3. Undantakið fyri brúksskylduni fyri fiskiloyvi fevnir eisini um veiðirættindi, sum er partur av kvotuumbýti sambært grein 24 í løgtingslógini við eigara av fiskifari undir fremmandum flaggi – sonevnd kvotu-transfers.

Stk. 4, nr. 4. Fiskiloyvi, sum eru latin til fiskiskap eftir norðhavssild, makreli og svartkjafti, eru undantikin brúksskyldu til og við 31. desember 2025. Hesi fiskasløg eru eisini undantikin 60%-regluni í sambandi við avhending av egnum árskvotum í grein 31, stk. 2.

**Til nr. 6**
Fylgibroyting av broyting nr. 3, har nýtt stykki verður sett inn.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, dagfesting

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá